# ítróttur

Nr. 140 • mikudagur • 25. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


**Stríð kring Føroyar**

s. 14-15



# Tvær nýggjar royndir í Atlantic Giant



*Regin Vágadal skal á ólavsøku verja heiti sítt sum Atlantsrisi. Hann fær kapping frá nøkrum av heimsins sterkastu monnum*

**Sterku menninir fara at kappast í sjey ymiskum greinum, tá Atlantic Giant verður í Havn á ólavsøku**

STERKIR MENN
*Eyðun Klakstein*

Nú er greitt, hvørjar kappingarnar verða í Atlantic Giant styrkikappingini, sum verður hildin á ólavsøku.

Í »Log lift« skal ein træbulur, ið vigar 115 kilo, lyftast so ofta upp um høvd sum gjørligt í 75 sekund.

»Deadlyft« er ein avbjóðing, har ein stong skal lyftast frá jørðini og upp. Byrjað verður við 300 kilo, og síðani verða 20 kilo løgd afturat so hvørt. Luttakararnir hava fýra royndir í part.

Kappingin »Stones« snýr seg um at lyfta 5 rundar steinar. Steinarnir viga 140, 150, 170 og 180 kilo, og teir skulu lyftast upp á ein platt innan 75 sekund.

»Millwalk« er at ganga runt við eini stong, har eini 400 kilo hanga uppi í.

Í »Wheel wip« skulu teir sterku menninir koppa einum dekki, ið vigar 300 kilo, átta ferðir runt so skjótt sum gjørligt. Her kappast tveir samstundis.

Í »Deadlift hold« skulu tedir lyfta 500 kilo, og síðani halda teimum so leingi sum gjørligt.

Seinasta kappingin kallast »Carry and Drag«,og her skulu tríggir kaggar setast í eina sleðu, sum síðani skal sleipast 25 metrar. Her kappast tveir samstundis.

## Altjóða góðkend

Tað verða átta sterkir menn, sum fara at kappast í Atlantic Giant. Regin Vágadal vann kappingina í fjør, og hesaferð fær hann kapping frá Janne Virtanen, sum er heimsins sterkasti maður, Hugo Girard, René Minkwitz, Jaroslaw Dymek, Zydrunas Savickas, Laszlo Fekete og Jón Valgeir Williams, sum kemur í staðin fyri íslendska landsmann sín, Tórfi Ólafson, sum er skaddur.

Dómarar eru Jamie Reeves úr Bretlandi og Ilkka Kinnunen úr Finlandi. Teir umboða eisini IFSA, sum er altjóða sambandið hjá sterkum monnum.

Kappigin á ólavsøku er altjóða góðkend av IFSA, og er eisini ein IFSA Grand Prix kapping.

Kappingin verður á ovara vølli í Gundadali 28 juli kl. 19.15. Tvær tær fyrstu kappingarnar verða tó á økinum, har standmyndin av Nólsoyar Páll stendur, og tær verða 28. juli kl. 12.00.

Atongumerki fáast í forsølu á Kunningarstovuni í Havn, og selt verður eisini, tá kappingin byrjar.



# Føroyskt umboð í toppinum

**Nú bert fýra umfør resta í í stóru opnu kappingini, Politiken Cup, í Keypmannahavn, er líkt til at John Arni Nilssen fer at blanda seg í ovarliga í ovaru hálvu**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*John Arni Nilssen ger vart við seg í Politiken Cup í hesum døgum*

160 luttakararar royna seg í hesum døgum í tiltiknu kappingini, Politiken Cup. Millum telvararnar eru níggju stórmeistarar og fleiri altjóða meistarar.

John Arni Nilssen hevur ognað sær fimm stig av sjey møguligum, og fær hann kendan danskan telvara ímóti sær í áttanda umfari, nevnliga Bo Jacobsen, sum tó hevur verri ratingtal enn John Arni.

Skopuningurin hevur vunnið tey talv, har hann hevur verið favorittur, og hevur hann tapt tvey talv ímóti tveimum stórmeistarum.

GM Nick de Firmian var sera heppin at vinna talvið teirra millum, tá John Arni tíverri leikti avgerandi feil í betri støðu og mátti eftir hetta leggja árarnar inn.

### Onnur standa seg væl

Ikki bert hevur John Arni av føroyingum higartil havt góð úrslit. Herluf Hansen úr Havn hevur sanniliga eisini telvað væl, við eitt nú tveimum góðum javnleikum ímóti nógv sterkari mótstøðu, har tann eini var sera sterki IM Klaus Berg.

Í sjeynda umfari vann hann eisini óvæntað á sterkari mótstøðu, og hevur Herluf fýra stig sum er eitt flott úrslit.

Kollfirðingur Hans Kristian Simonsen hevur eisini leikt væl, og hevur somuleiðis fýra stig sum er yvir tað væntaða.

Miriam Olsen hevur trý stig og er tað á góðari leið.

Á odda liggur russin GM Alexander Rustemov við 6,5 stigum, meðan danin GM Peter Heine Nielsen á øðrum plássi hevur seks stig.

Nevnast kann at Atlantic Airways stuðlar kappingini, og skulu teir hava takk og virðing fyri at vísa talvi áhuga. Fylgjast kann við kappingina á www.kbhsu.dk

## Talvið hesa vikuna

**Herluf Hansen (2044) — John Rendboe DK (2243)**
**Politiken Cup Copenhagen (7), 22.07.2001**

1.d4 Nf6 2.c4 e6 3.g3 d5 4.Nf3 Bb4+ 5.Bd2 Bxd2+ 6.Nbxd2 0-0 7.Bg2 b6 8.0-0 Bb7 9.Rc1 Nbd7 10.c5 Herluf roynir at steingja svarta bispin inni 10...bxc5 11.dxc5 c6 12.Qa4 a5 13.Nd4 Qc7 14.Rfd1 Rfc8 15.f4 Ba6 16.e4 Rab8 17.Qc2 Rb4 Svartur kann ikki klaga um støðuna, men enn er spenningur í støðuni 18.Qc3 dxe4 19.Bxe4 Nxe4? [19...e5 20.fxe5 Nxe5 hevði verið betri hjá svørtum] 20.Nxe4 Rc4 21.Qe3 Rd8 22.b3 Rxc1 23.Rxc1 e5 24.Nf5 exf4 25.gxf4 Nf8 26.Qg3 Ne6 27.Ned6 Kh8 28.Kf2 f6? 29.Re1?! [29.Qe3! er helst betur.] 29...Nxc5 30.Re7 Qxe7 svartur roynir hetta frúgvaoffur sum tó ikki bjargar støðuni 31.Nxe7 Rxd6 32.Qe3! Rd2+ 33.Kg1 [33.Qxd2 Ne4+] 33...Rd1+ 34.Kg2 Bf1+ 35.Kf2 Nd3+ 36.Kg3 h5 37.Qb6! h4+ 38.Kxh4



Og svartur tapti uppá tíð í taptari støðu. 1-0

# Anand dumpaði

**Maðurin, sum ikki hevði tapt eitt talv í eitt ár, tapti heili fýra talv í kappingini Dortmund 2001**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í krútsterku stórmeistarakappingini í Dortmund vórðu tvær sera óvæntaðar hendingar.

Fyri at hyggja fyrst á tí positivu hendingina, so megnaði lægstrataði Veselin Topalov at deila fyrsta pláss við Vladimir Kramnik.

Topalov steig av álvara inn á talvpallin miðskeiðis í nítiárinum, tá hann eitt nú vann á Kasparov, og varð eitt skifti fjórðsterkasti telvari í heiminum. Síðani hevur bert at kalla gingið niðureftir, men nú er helst vend aftur komin í.

Ringt er at trúgva tí, men triðfremsti telvarin í heiminum, indarin Viswanthan Anand, endaði aftastur við bert seks javnleikum og heili fýra tapum. Hann hevði undan hesa kapping ikki tapt eitt talv í eitt ár. Orsøkirnar til hví tað endaði so galið hjá Anand eru helst fleiri, men tað kendist sum hansara telving manglaði skipan og vilja.

### Kramnik stílar eftir oddaplássinum

Beint framanfyri Anand og á fimta plássi kom Michael Adams, sum eisini hevði eina óskiljandi ringa kapping. Alexander Morozevich hevði eina óstøðuga kapping, har hann tó bardi seg fram til eitt hampiligt fjórða pláss. Tann ungi Peter Leko vann sítt fyrsta talv og leikti síðani níggju javnleikir á rað og harvið eitt trygt triðja pláss til hansara.

Kappingin um fyrsta pláss gjørdist sera hørð. Kramnik lá leingi hálvt stig ovari enn Toplalov, men ímóti endanum tók Topalov seg framum og líkt var til, at hann kundi halda hesa støðu. Í næstseinasta talvinum hálaði Kramnik tó seg ájavnt við Topalov, og soleiðis varð eisini endaliga støðan.

Kramnik hevði enn eina støðuga og góða kapping uttan tap. Hann lat eftir lokna kapping heilsa og siga, at hann nú av álvara stevnir ímóti fyrsta plássinum í heiminum, tá rating viðvíkur. Og hetta pláss eigur Kasparov sjálvandi (Kasparov: 2838 - Kramnik: 2802).

Beint sum henda kapping varð lokin, byrjaði onnur sterk kapping í Biel. Eitt nú megnaði 70 ára gamli aldursforsetin Victor Korchnoi í fyrsta umfari at vinna á Boris Gelfand við svarta fólkinum.

### Endaliga støðan:

| | |
|---|---|
| Kramnik | 6,5/10 |
| Topalov | 6,5 |
| Leko | 5,5 |
| Morozevich | 5 |
| Adams | 3,5 |
| Anand | 3 |


